

**Óli Jacobsen**
*olijacobsen@post.olivant.fo*

hann kláraði ikki at fáa meg aftur. Hann var eitt sindur firtin við meg eina tíð eftir hetta, men tað javnaði seg aftur.

## Upp á Skælingsfjall í torvtíð

Í sambandi við torvi kann eg nevna tvær hendingar: Tann fyrra lýsir, hvussu nógv, ið varð kravt av einum í torvtíðini.

Um jóansøkuna var tað vanligt hjá røskum fólki at fara upp á Skælingsfjall. Hetta var tyngri tá enn nú, tað kann koyrast stóran part av teininum.

Hjá teimum, sum ikki vóru so væl fyri at hava ross, var tað vanligt at fara við báti inn í Kaldbaksbotn og so til gongu upp á fjallið.

So var tað ein dagin, at skipað varð fyri eini slíkari útferð. Pápi vildi hava meg ikki at fara, tí vit skuldu í torv dagin eftir. Men eg helt, at sjálvt um eg alla náttina skuldi vera uppi á Skælingi, so skuldi eg nokk gera mín part av torvarbeiðinum dagin eftir.

Vit fóru úr Havn um 9 tíðina á kvøldi, og vit vóru uppi á Skælingsfjalli á midnátt. Hetta var ein ógloymandi sjón at síggja oyggjarnar í sólsetur.

Vit vóru so heima aftur um klokkan 8 á morgni. Tá vóru hini í húsinum klár at fara í torv.

Pápi var eitt sindur trútin og helt, at eg var nú so móður, at eg kundi eins væl vera heima. Men eg helt, at tey kundu fara avstað. Tá eg hevði etið, skuldi eg koma aftaná, men eg fór tó á ein torvheið, har eg var einsamallur.

Tá ið eg var liðugur kl. 7 á kvøldi fylti eg leypin. Tað var ongantíð farið til hús við tómum leypi, og eg kom heim samstundis sum hini. Tá hevði eg eisini gjørt mín part, men eg var eisini móður.

## Mundi verið útideyður eftir torvi

Ein onnur minnilig hending var tann 1. desember 1917. Poul Niclassen, seinni kendur sum limur í landstinginum og blaðstjóri á Dimmalætting, var tá prentari á Dimmalætting. Hann hevði torvheiðar nærindis okkara í Hoyvíkshaganum.

Vit fóru um hesa tíðina ofta saman seinnapartar eftir torvi, og tað gjørdu vit eisini hendan dagin. Dagurin var jú stuttur. Tí fóru vit so tíðliga, at vit kundu vera aftur, áðrenn tað gjørdist myrkt. Veðrið var gott, tá ið vit fóru, men tað vóru skýggj á luftini.

Tá ið vit komu til torvheiðarnar hjá Poul, sum lógu nærri býnum enn okkara, skeyt hann upp, at vit fyltu báðar leyparnar av teirra torvi, so kundu vit báðir næstu ferð taka av okkara torvi.

Beint sum vit høvdu fingið leyparnar á bakið og skuldu fara til gongu heim, gjørdist so ógvuliga myrkt. Samstundis kom ein hvirla, so vit mundu dottið. Nú var knappliga kavaroksódn. Hetta dámdu okkum einki. Víst høvdu vit stormin í ryggin, men vit sóu einki, ikki so frægt sum okkara egnu føtur. Eisini skuldu vit fara um Hoydalsánna. Um hana var ein smøl brúgv, og hon kundi vera trupul at finna í hesum líkindum. Vandin við at koma ov langt oman var at fara í Svartafoss. Vit máttu rópa okkara millum, og fyri ikki at missa hvønn annan burtur, máttu vit halda í hvønn annan.

Vit umhugsaðu at seta leyparnar frá okkum. Men hildu kortini, at teir vóru ein ávís barlast, so vit ikki fóru á flog.

Vit vóru so merkiliga hepnir, at vit komu beint á brúnna, og visti tá, hvar vit vóru. Nú vistu vit eisini, hvussu vit skuldu sleppa undan Svartafoss. Vit komu oman á Sanatoriivegin, og nú var bert at fylgja honum. Niðri við plantaguna stóð ein bonkur. Her settust vit deyðamóðir at fáa eina hvíld, lukkuligir um at vera komnir aftur til býin.

Tá vit komu aftur í Ólastovu var eitt rættiligt uppstandilsi. Tey vóru bangin og ætlaðu at senda fólk at leita eftir okkum. Tað hevði nú ikki nyttað nógv í hesum veðrinum.

Tað vísti seg eisini morgunin eftir, at nógv fólk vóru vilst inni í sjálvum býnum og vóru farin inn í nærmasta hús at fáa sær skjól.

## Ein feigdardagur

Eitt farmaskip var komið á redina hendan dagin og var byrjað at innskipa klippfisk. Nakrir maskinbátar vóru komnir út til skipið, tá ið stormurin brast á. Bátarnir tordu ikki at loysa frá skipinum, tí teir roknaðu ikki við at koma til lands aftur. Hetta var, áðrenn tað bar til hjá skipum at leggja at í Havn. Bátarnir sluppu ikki inn aftur fyrr enn morgunin eftir.

Ein útróðrarbátur av Nesi í Eysturoynni fekk eisini illveðrið á seg við Eystnes. Hann lá alla náttina í lívd av nesinum og kom fyrrapartin dagin eftir inn á Havnina. Tað varð roknað sum eitt undur, at hann kom aftur.

Hesin stormur kostaði eisini fleiri mannalív. Í Sandavági lá ein bátur fyri teymi. Ein maður var farin umborð at pumpa bátin. Men hann slapp ikki í land aftur. Teymurin slitnaði, og báturin rak til sjós. Maðurin hevur eftir øllum at døma ikki fingið motorin í gongd. Seinni varð báturin funnin undir Grímsfjalli í Hvalba, og maðurin var funnin deyður longri uppi í haganum. Maðurin er eftir tí at døma komin livandi í land.

Í Funningi ella Funningsbotni var ein eldri maður við tveimum ella trimum abbabørnum á veg um fjallið, tá ið veðrið brast á. Tey vóru funnin deyð, tá ið farið varð at leita morgunin eftir.

Í Vágum vóru nøkur fólk farin til gongu millum Sørvág og Miðvág. Men tey komu til eina torvkrógv og tømdu hana so mikið, at tey kundu liggja her til morgunin eftir, tá veðrið gjørdist betri.

Úr Trongisvági vóru tveir mans hvør sær farnir til Hvalbiar og vóru komnir til Mannagjógv, tá ið tað brast á. Annar maðurin var so skilagóður, at hann helt seg til ein varða, hann kom til. Hann helt hitanum við at taka varðan niður og laða hann upp aftur alla náttina, til hann var funnin av leitingarfólki. Hin maðurin varð nakrar dagar seinni funnin deyður vestari á fjallinum. Her er hann uttan iva vilstur, og hetta gjørdist hansara lagna.



*Menn skera torv*



*Djóni og Poul í Geil eftir torvi í Hoyvíkshaganum*

Mynd: Andreas Ziska



*Hetta minni frá torvtíðina síggja vit enn á Glaðsheyggi. Aftanfyri síggja vit neytakonuna*